Fótbóltur:

# Gallaveitslan verður leygarkvøldið

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Nú kunnu fótbóltsleikarar kring landið av álvara taka saman um fótbóltsárið, ið fór.

Sum vant, so endar fótbóltsárið aftur í ár við gallakvøldi. Annað árið á rað er tað GÍ, sum hevur bjóðað seg fram at standa fyri hesum, og annað árið á rað verður tað Mentanarhúsið í Fuglafirði, sum ska vera karmur um tiltakið.

Undir borðhaldinum er sjálvt hæddarpunktið kjósanin av teimum, sum hava verið best hetta árið, og sum vant, so eru tað liðformenninir og venjararnir, sum hava avgerandi orðið í hesum.

Eftir borð- og undirhaldið verður almennur dansur, har Terji Rasmussen band spælir.

Sum skilst, so er hevur undirtøkan fyri tiltakinum aftur í ár verið góð, men eru nøkur, sum enn ikki hava teknað seg, og sum kortini hava hug at fara við, so ber til at senda ein teldupost til galla@gigotu.fo ella á tlf.: 21 79 89

# Seinasta Daewoo-umfarið




## Fjórða og seinasta umfarið í Daewoo Marathon kappingini verður nú leygardagin

RENNING
*tíðindaskriv*

Leygardagin 25. oktober skipa Treysti og Roysnið fyri rennikapping á Kambsdali. Kappingin er samstundis fjórða og seinasta umfar av Daewoo Marathon Cup 2003.

Kappast verður á ymsum teinum hjá børnum og vaksnum. Startur og mál eru við bygningin hjá P/F Esmar Simonsen á ídnaðarøkinum á Kambsdali.

**Byrjað verður sambært hesi skrá:**

| | |
|---|---|
| Kl. 09:30 | Avheintan av startnumrum |
| Kl. 10:00 | Vaksin renna 5,595 km |
| Kl. 10:30 | Dreingir-7/Gentur-7 (f. 1996 ella seinni) renna 359 m |
| Kl. 10:40 | Dreingir-10/Gentur-10 (f. 1993-95) renna 359 m |
| Kl. 10:50 | Dreingir-13/Gentur-13 (f. 1990-92) renna 840 m |
| Kl. 11:00 | Dreingir-17/Gentur-17 (f. 1986-89) renna 840 m |

Aftan á verða heiðursmerki handaði á staðnum.

### Seinasta umfar

Kappingin á Kambsdali er seinasta umfar av Daewoo Marathon Cup 2003. Í fýra umførum skuldu luttakararnir tilsamans renna 42.195 metrar ella tað sama sum eitt heilt marathon.

Vinnarin av Daewoo Marathon Cup verður tann rennarin, sum samanlagt hevur brúkt minst tíð til at gjøgnumføra tann samlaða teinin. Fyri hvørt umfar verða latin heiðursmerkir til nummar 1, 2 og 3. Í samlaðu kappingini verða steyp latin til nummar 1, 2 og 3. Kappast verður eisini í einum bólki fyri veteranar, t.e. teimum, sum eru fødd í 1957 ella fyrr.
Undan seinasta umfari er støðan hjá teimum vaksnu hendan:

**Menn:**

| | |
|---|---|
| 1 Jonhard Larsen, Treysti | 2:18:54 |
| 2 Sigurð Justinussen, Bragdið | 2:20:28 |
| 3 Sam Vang, Bragdið | 2:25:33 |
| 4 Súni Jacobsen, Bragdið | 2:32:05 |
| 5 Trygvi Hansen, Bragdið | 2:32:34 |
| 6 Ólavur Herup Olsen, Bragdið | 2:45:00 |
| 7 Óla J. Kristoffersen, Bragdið | 2:45:21 |
| 8 Henning C. Poulsen, Bragdið | 2:47:03 |
| 9 Flemming Petersen, Roysnið | 2:49:31 |
| 10 Holger Arnbjerg, Bragdið | 3:04:58 |
| 11 Hans Birgir Hansen, Bragdið | 3:35:41 |

**Veteranar:**

| | |
|---|---|
| 1 Ólavur Herup Olsen, Bragdið | 2:45:00 |
| 2 Henning C. Poulsen, Bragdið | 2:47:03 |
| 3 Holger Arnbjerg, Bragdið | 3:04:58 |
| 4 Hans Birgir Hansen, Bragdið | 3:35:41 |

### Fyri børn

Barnakappingin leygardagin er eisini seinasta umfar av Daewoo Mini Marathon Cup fyri børn. Eins og hjá teimum vaksnu er kappingin samansett av fýra rennikappingum, men eru hesar tilsamans 4.219 metrar (ella 1/10 marathon) til longdar hjá dreingjum og gentum –13 og –17. Hjá dreingjum og gentum –7 og –10 er samlaði teinurin 2.109 metrar (ella 1/20 marathon).

Vinnari av Daewoo Mini Marathon Cup verður so tann rennarin, sum samanlagt hevur brúkt minst tíð til at gjøgnumføra tann samlaða teinin. Fyri hvørt umfar verða latin heiðursmerkir til nummar 1, 2 og 3.

Eisini hjá børnunum verða steyp latin til nummar 1, 2 og 3 samanlagt, t.e. bert børn, sum hava gjøgnumført øll fýra umførini, telja við í samlaða úrslitinum av Daewoo Mini Marathon Cup.

Hjá børnunum er støðan hendan áðrenn kappingina leygardagin:

**Gentur –7:**

| | |
|---|---|
| 1 Durita Skoradal, Roysnið | 8:18 |
| 2 Bjørk Reynagarð Svabo, Miðvágur | 8:48 |

**Dreingir –7:**

| | |
|---|---|
| 1 Ólavur Joensen, Bragdið | 7:39 |
| 2 Steingrímur Hallsson, Bragdið | 7:50 |
| 3 Beinir Johannesen, Treysti | 8:03 |
| 4 Bartal Wardum, Tórshavn | 8:58 |

**Gentur –10:**

| | |
|---|---|
| 1 Katrin S. Wardum, Tórshavn | 7:58 |

**Dreingir –10:**

| | |
|---|---|
| 1 Jóhan á Plógv Hansen, Bragdið | 6:08 |
| 2 Øyvind Lützen, Bragdið | 6:22 |
| 3 John Viljam Johannesen, Treysti | 6:48 |
| 4 Regin Joensen, Bragdið | 6:58 |

**Gentur –13:**

| | |
|---|---|
| 1 Jenny Svabo, Bragdið | 13:01 |
| 2 Christa R. Weihe, Bragdið | 14:44 |
| 3 Bjørg Seloy, Bragdið | 15:46 |

**Dreingir –13:**

| | |
|---|---|
| 1 Robin Jønsson, Roysnið | 11:46 |
| 2 Jan Elmar Sørensen, Treysti | 12:20 |
| 3 Daniel Djurhuus Rein, Vestmanna | 12:48 |

**Dreingir –17:**

| | |
|---|---|
| 1 Álvur F. Christiansen, Treysti | 11:46 |

Tilmelding fer fram á heimasíðuni www.athletics.fo innan fríggjakvøldið á midnátt.

Fyrireikararnir úr teimum báðum feløgunum leggja dent á, at rennikappingarnar eru fyri øll, og vóna teir, at luttøkan verður góð.




# Pedagogur

## Til Sambýli á Líknagøtu

Innan Almannaráðið og stovnar undir tí, við fyribils tænastu á Sambýlunum í Runavík, er eitt pedagogstarv leyst at søkja til setan 15 nov. 2003 ella eftir nærri avtalu.

Starvið verður sett sum tænastumannastarv, eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag, lønt stigini 24-31 eftir lønartalvu pr. 01.03.03.

Starvið ið søkt verður eftir, fær til uppgávu at arbeiða í Sambýlinum á Líknagøtu 1, hjá 3 monnum við diagnosuni autismu. Hetta arbeiðið krevur at viðkomandi umsøkjari er kroppsliga og sálarliga væl fyri, er førur fyri at kunna gera kroppsligt arbeiði saman við monnunum, ganga túrar, svimja, gera fimleik o.a.

Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna, skiftandi vaktir og annaðhvørt vikuskiftið.
Starvsøkið er allur stovnurin, og tann setti kann rokna við at fáa aðrar uppgávur aðrastaðni í skipanini, um tørvur gerst á tí.

Nærri fæst at vita um størvini frá Oddfríðu Højgaard, leiðara á tlf. 226121.

Umsóknir við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu vera stovninum í hendi innan **07 nov. 2003.**

**Bústovnurin á Rúnarvegi 6**
Att: Leiðarin
Fo-620 Runavík



# Hús í DK til sølu



Hús, 10 km frá Vejle, 72 fermetrar + útbygningur á 14 fermetrar, fullur kjallari, dupult garaga. Grundøkið er 800 fermetrar.
Húsini standa í friðarligum umhvørvi og sera sentralt.

**Tlf. 423177**



**Føroya Psykiatrifelag**

# Aðalfundur

Ársaðalfundur verður tann 28. november 2003.

**Fundarskrá:**
Lógarbroyting - annars samb. lógum felagsins.

**Nevndin**



# Grundøki Yviri við Strond



Um nóg høgt boð fæst, selja vit eitt grundøki, sum liggur beint norðanfyri Fiskimálaráðið Yviri við Strond.

Stykkið er óbygt, men partvíst planerað til parkeringsøki, hevur heitið matr. nr. 620 u og er til støddar uml. 1.400 m².

Sambært byggisamtyktini liggur stykkið í 2. grundumráði, sum er lagt til blandaða bústaðar- og miðstaðarbygging.

Nærri fæst at vita við at venda sær til

**Óla Jákup Kristoffersen, adv.**
e-mail ojk@advlaw.fo ella
**Elin Svínoy**
e-mail els@advlaw.fo



# Vinnuøki á Sandvíkahjalla

Um nóg høgt boð fæst, er eitt vinnuøki á Sandvíkahjalla til sølu.

Talan er um eitt óbygt grundøki til støddar 4.478 m².

Sambært byggisamtyktini liggur grundøkið í umráði B 7, har loyvt er at byggja hús til stór vinnuvirki, verksmiðjur, goymslur og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi.

Vanligi servitutturin um at byggjast skal innan eitt ávíst áramál, og at ikki kann seljast víðari uttan at henda treyt er lokin, er ikki galdandi fyri hesa ogn.

Nærri fæst at vit við at venda sær til

**Óla Jákup Kristoffersen, adv.**
e-mail ojk@advlaw.fo ella
**Elin Svínoy**
e-mail els@advlaw.fo



## Frítíðarheimið í Skrivaragøtu søkir

# avloysara fyri pedagog

**í farloyvi frá 1. november 2003 til 31. oktober 2004**

at arbeiða 40 um vikuna frá 1. nov., ella eftir nærri avtalu. Talan er um skiftandi arbeiðstíðir og í vikuskiftum.

Setunar- og lønarviðurskifti sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag.

Frítíðarheimið er ein samdøgusstovnur, har børn, ung, vaksin og eldri menningartarnað koma til umlætting í styttri ella longri tíðarskeið. Talan er um bæði skipaða umlætting, har teir ávísu bólkarnir eru til umlætting hvør sær og um vanliga umlætting, har fleiri aldursbólkar eru umboðaðir samstundis. Pláss er fyri 5 fólkum í senn.

Endamálið við arbeiðinum er m.a. at skapa tryggar karmar hjá brúkarnum og at seta í gongd og skipa fyri virksemi, sum hevur áhuga fyri teir einstøku bólkarnar/brúkarnar.
Umráðandi er, at tann sum verður settur kann arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevni.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran ella varaleiðaran, tlf. 313353/213353, millum kl. 8 og 16.

Umsóknarfreistin er 28. okt 2003 og skulu umsóknir við prógvi, viðmælum v.m., stílast til:

**Stýrið fyri**
**Frítíðarheimið Skrivaragøtu 5**
100 Tórshavn





**Ellis- & Avlamisheimið í Vágum**
FO-370 Miðvágur
Tlf. 332600 · Fax 333604

# Ellis- & Avlamisheimið í Vágum

Eitt starv sum hjálparfólk í køkinum er hervið leyst at søkja at byrja 1. desember 2003.
Starvið er ¾ tíð og lønt eftir Føroya Arbeiðarafelag.

Ongin ávís útbúgving krevst, men dentur verður lagdur á góð samarbeiðsevni, hug og hegni til vanligt køksarbeiði – og tað at veita brúkaranum eina góða tænastu.

Nærri at vita um starvið fæst við at venda sær til heimið persónliga ella at ringja til økonomuna, tlf. 332604, ella til leiðaran, tlf. 332600.

Skrivlig umsókn við frásøgn um arbeiðsroyndir v.m. verður at stíla til stýrið og senda til heimið áðrenn 9. november 2003.